## Frítíðarløn 2. mai 2005

**Frítíðarlønin verður útgoldin 2. mai 2005.**

Eigur tú frítíðarløn, fært tú eina fráboðan.

**Býrt tú í Føroyum**
Ert tú flutt/-ur, síðani tú boðaði fólkayvirlitinum frá, fer fráboðanin retur til Frítíðargrunnin.
Fyri at sleppa undan hesum skalt tú boða **fólkayvirlitinum** frá nýggja bústaðnum.

**Býrt tú uttanlands**
Býrt tú uttanlands, og ert tú flutt/-ur, síðani tú boðaði fólkayvirlitinum frá, fer peningurin eisini retur til frítíðargrunnin.
Fyri at sleppa undan hesum skalt tú boða **Toll- og Skattstovuni** frá nýggja bústaðnum.

**Kontunummar**
Frítíðarlønin fyri 2005 fer á somu kontu sum í fjør. Vilt tú broyta kontunummarið, verður tú biðin um at boða okkum frá nýggja kontunummarinum.
Hetta kanst tú gera við at útfylla fráboðanina niðanfyri og senda okkum hana **áðrenn 20. apríl 2005**. Ella tú kanst útfylla fráboðanina á heimasíðuni www.tollskatt.fo.

Hevur tú spurningar, kanst tú ringja til okkum á telefon 37 10 51.
Vit svara mán. - hós. kl. 9.00 - 15.30, og frí. kl. 9.00 – 15.00

| | |
|---|---|
| P-tal: | |
| Navn: | |
| Bústaður: | |
| Postnr. og bygd/býur: | |
| Peningastovnur: (bert føroyskur) | |
| Kontunummar: | |

_____________ , / 2005 ______________________
Undirskrift

Fráboðanin skal sendast: Toll- og Skattstovu Føroya
Suðuroyar Øki
Postsmoga 69
FO-800 Tvøroyri

TÓRSHAVNAR KOMMUNA





Býarstýrini Nuuk, Reykjavík og Tórshavn hava sett pening í grunnin, hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

## Grunnurin
### til frama fyri samstarvi og fatan millum Nuuk-Reykjavík-Tórshavn

Nú verður aftur møguleiki at søkja stuðul úr felagsgrunninum Nuuk-Reykjavík-Tórshavn. Ætlanin er í juni mánað at taka avgerð um veitan av stuðli.

Tórshavnar býráð heitir tí á einstaklingar, feløg o.o., ið halda seg koma undir treytirnar fyri stuðli, um at senda býráðnum umsóknarblað við frágreiðing um tiltakið, nær tað verður og um mettan kostnað. Hetta umsóknarblað fæst í snarskivuni ella inni á heimasíðuni hjá kommununi.

Meiri fæst at vita um treytir við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra, tlf. 302010.

Umsókn merkt "Nuuk-Reykjavík-Tórshavn" eigur at vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 2. mai 2005.

www.nuuk.gl www.reykjavik.is www.torshavn.fo

FØROYA LANDSSTÝRI

# Fiskivinnugransking søkir samskipara

Fiskimálaráðið tók í 2001 avgerð um at skipa granskingarjáttanina, *Fiskivinnuroyndir,* í greiðari karm. Samstundis varð avgerð tikin um at kanna á hvørjum økjum og hvussu *fiskivinnugransking* kundi verða ment í Føroyum. Verandi samskipari fer í annað starv, og verður starvið tí lýst leyst at søkja.

Arbeiðið sum samskipari er sera avbjóðandi og fjøltáttað:
- Arbeiðið fevnir um at samskipa arbeiðið í Fiskivinnuroyndum. Tað snýr seg um at skipa málsviðgerðina av umsóknum, taka stig til tiltøk, sum birta undir granskingar og menningarvirksemið og miðling av úrslitum.
- Arbeiðið fevnir eisini um at samskipa granskingarvirksemið, sum verður játtað av játtanini til granskingarætlanir. Í løtuni er hetta skipað í kjarnar: ein fyri reiðskaps/fiskitøkni, ein fyri lívtøkni og ein fyri framleiðslutøkni.
- Somuleiðis skal samskiparin taka stig til samstarv í Føroyum og uttanlands, sum kann styrkja gransking og menning innan fiskivinnusektorin í síni heild.

Arbeiðið verður stýrt av einum stýrisbólki við umboðum frá Fiskimálaráðnum, Fiskirannsóknarstovuni, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Menningarstovuni, Ráfiskakeyparafelagnum og Ráfiskaseljarafelagnum.

Vit vænta av tær :
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst.
- At tú hevur neyðugan og viðkomandi akademiskan førleika.
- At tú hevur fyrisitingarligar royndir.

Starvið er tíðaravmarkað. Tann, sum verður settur, skal tola broytingar í starvsinnihaldi og -formi, serliga við atliti at tí skipanarliga formi fiskivinnugranskingin kemur at taka frameftir. Starvsstaðið er í Fiskimálaráðnum, og tann setti kemur eisini at loysa ávísar uppgávur fyri Ráðið.

Løn og setanarviðurskifti verða sambært sáttmála millm avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. mai 2005.

Eru spurningar ber til at venda sær til Hjalta í Jákupsstovu tel 353900 ella hjaltij@frs.fo

Umsóknir við avritum av viðkomandi prósvkjølum og ævisøgu (CV) skulu sendast til:

**Stýrisbólkin fyri Samskiparan í Fiskivinnugransking**
Att: Hjalti í Jákupsstovu
Fiskirannsóknarstovan
Postboks 3051
FO-110 Tórshavn

Starvslýsingar




á portal.fo